Próvtøkutíð:

# Undir jørð á Norðoyastevn

**Tað er sama skilið á hvørjum ári. Norðoyastevna er, men næmingarnir á H.F-skeiðnum í Klaksvík sita við nøsini niðri í bókunum. Próvtøkurnar hjá 2. flokki eru nógvar og tættar, so hjá teimum má Norðoyastevnan bíða til næsta ár**

NORÐOYA-STEVNAN 05
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*



*Elsa Maria Simonsen var væl nøgd við 8 talið, hon fekk í geografi hendan dagin, tí hon heldur seg avgjørt ikki vera próvtøkufólk*

Tað er ikki júst Norðoyastevnuprát, ið setur sín dám á prátið á gongini á H.F-skeiðnum í Klaksvík hesar dagarnar. Seinastu munnligu próvtøkurnar hjá 2. p skulu fáast frá hondini, og hendan fyrrapartin, vit støkka inn á gólvið, eru tey uppi í geografi. Spenningurin hongur í luftini. Við eitt fer hurðin inn til próvtøkuhølið upp, ein løta gongur, og so hoyrist róp og eitt "Yes!". Ein genta hevur skorðað sær eitt 9 tal, og hinar á gongini leypa um hálsin á henni og ynskja tillukku, men seta seg skjótt aftur á bonkin at bíta negl ella blaða skundisliga í eini bók.

### Høvdið klárt

Gentan við 9 talinum fer smílandi avstað - men ikki heim at halda frí. Tað er tað onki, sum eitur í hesum próvtøkudøgum, tí næsta próvtøkan er longu um tveir dagar.

Men hvat við Norðoyastevnuni? Skulu hesa ungu dámurnar slett ikki í býin, í dans ella bara út at hugna sær saman við vinfólki komandi dagarnar?

- Nix! Norðoyastevnan má passa seg sjálvan. Mánadagin aftaná Norðoyastevnu skulu vit upp í sálarfrøði, og tað krevur, at tú heldur høvdið klárt, flennir ein av gentunum.

– Tað er kanska eitt sindur moðið at síggja øll hini ganga og pynta seg og fara í býin. Men eg veit ikki, eg leggi ikki so nógv í tað, tí Norðoyastevnurnar líkjast so nógv eftirhondini. Eg kann saktans bíða til næsta ár, sigur ein genta, meðan hon kannar listan fyri at vita, nær tað er hennara túrur at fara inn at taka ein spurning.

– Hevði tað verið Summarfestivalurin, sum var hesar dagarnar, so var tað nakað annað. So hevði man ordiliga følt, at man forsømdi seg. Ikki tí, tað hevði verið hugnaligt at farið í býin við øllum hinum ella til kappróður, men hvør veit, kanska tað fer at oysregna, sigur ein, sum var uppi í geografi í gjár, og nú er komin at forvitnast eftir, hvussu tað gongur hjá hinum í flokkinum.



*- Tað hoyrast sjálvandi onkur huff og puff, tá næmingarnir fáa at vita, nær tey skulu upp. Men tey innstilla seg skjótt uppá, at Norðoyastevnan má bíða, sigur Sigrun Skálagarð, leiðari á Klaksvíkar H.F-skeiði*



*Sólva Petersen er ikki so ovurfegin um, at tað verður hennara túrur inn í próvtøkuhølið um eina løta*



*Merry Kalsø og Gigi Stampe ætla sær at ... tú vilt hava eitt hampiligt úrslit, siga tær*

### Seðil á køliskápið

Merry Kalsø og Gigi Stampe hoyra til í tí eldra endanum av 2. p. Tað hevur gingið væl við próvtøkunum higartil, og soleiðis skal tað helst eisini halda fram, siga tær avgjørdar.

– Vit fara stutt sagt undir jørð á Norðoyastevnu. Tað er ikki so nógv annað at gera, um man vil verða so væl fyrireikaður, sum gjørligt til próvtøkuna. Og tað vil man sjálvandi, tá man nú hevur valt at taka hesa útbúgvingina, siga tær báðar, sum eisini plaga at lesa saman.

– Tað er nokk meira tey ungu, sum halda tað vera strævið ikki at kunna vera í dans til langt út á náttina. Vit eru so gamlar, so fyri okkum ger tað minni, heldur Merry, sum allíkavæl vildi ynskt, at hon hevði betri tíð til hugna sær heima og gera mat til gestirnar hesar dagarnar.

– Men gott er. Vit seta bara ein seðil á hurðina á køliskápínum: "Gerið so væl. Fáið tykkum sjálvi", og so mugu menninir bara